## KÍ slapp heldur ikki



Aðra staðni á síðuni skriva vit, at FSF hevur noktað NSÍ og Skála at flyta dyst. Hetta tí grundgevingarnar fyri flytingini ikkii vórðu mettar sum nóg góðar. Sama lagna hevur eisini rakt KÍ, sum hevur ynskt at flyta sín dyst móti VB/Sumba tveir dagar. Ein flyting, sum suðuroyingarnir eisini eru sinnaðir at fremja. Orsøkin er, at KÍ-venjarin Tony Paris skuldi verða burturstaddur, tá dysturin annars skal spælast, men tann orsøkin verður heldur ikki mett sum haldgóð.

**- mørk**

## Nýggj raðfylgja

Á aðalfundi leygardagin tók FSF støðu um, at roknihátturin nú verður broyttur til tað gamla, tá finnast skal fram til raðfylgjuna á liðum, sum eru jøvn í stigum. Fyri nøkrum árum síðani vórðu reglurnar her broyttar, soleiðis at innanhýsis uppgerðir vórðu roknaðar, áðrenn málmunin. Nú eru reglurnar broyttar aftur til tað, sum var galdandi fram til 1999. Nevnliga at málmunurin fyrst verður roknaður og síðani skotin mál.

**-mørk**

# Fullmannaðir gøtumenn til Havnar

**Hjá B36 eru Fróði Benjaminsen og Alex dos Santos aftur tøkir, men aðrir eru eisini falnir frá**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Aðru ferð innan fýra dagar skal B36 á heimavølli spæla týdningarmiklan dyst, har eitt framhaldandi pláss í oddastríðnum stendur upp á spæl.

Hesa ferð eru tað gøtumenn, sum um vikuskiftið vunnu seg upp á triðja plássið, sum koma á vitjan, og sum skilst, so verður tað eitt fullmannað GÍ-lið, sum vitjar. Hvørki skaðar ella leikbann hótta liðið.

Í B36 kunnu tey fegnast um, at Fróði Benjaminsen og Alex Jose dos Santos nú aftur eru tøkir, eftir at teir hava sitið leikbann av sær. Somuleiðis kann venjarin hjá liðnum, Sigfríður Clementsen, nú aftur sessast við beinkin, eftir at eisini hann hevur sitið dystarbann av sær.

Hinvegin eru aðrir hjá B36, sum ikki fáa tikið lut í dystinum. Mikkjal Thomassen er leikbannaður, eftir at hann fekk reytt kort móti EB/Streymi. Hartil breyt Jóhan V. Gunnarsson nøsina í dystinum seinasta sunnudag, og tí er heldur ikki hann tøkur. Hartil fekk Jákup Mikkelsen ein snudd, tá spælt varð sunnudagin, men sum skilst, so roynir hann at spæla kortini.

# Skála noyðist kortini til Løkin

**FSF noktar fyri at flyta dystin, soleiðis sum feløgini annars vóru samd um**

Fótbóltur
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at dysturin millum NSÍ og Skála verður fluttur til komandi týsdag, heldur enn at spælast mikukvøldið.

Bæði feløgini vóru samd um hesa flyting, og tá plagar talan sjáldan at vera um nakrar formligar trupulleikar við flytingini.

### FSF segði nei

Men trupulleikar vóru nú kortini. Í FSF verður ikki mett, at talan var um nóg haldgóða orsøk at flyta dystin, og boðini eru, at dysturin skal spælast mikudagin.

Tað merkir, at NSÍ noyðist um at vera Óla Hansen og Dánjal Hansen fyriuttan. Teir báðir skulu uttanlands í arbeiðsørindum. Tá dysturin upprunaliga varð ásettur at vera sunnudag, varð ferðin løgd soleiðis til rættis, at teir vóru aftur á klettunum undan hesum. Landsdysturin móti Pólandi hevði tó við sær, at umfarið varð framskundað, og tí setti NSÍ seg í samband við Skáal fyri at fáa dystin fluttan.

### Skerdir skálamenn

Missurin hjá NSÍ av teimum báðum, Hansen, er tó fyri lítið at rokna, um hugt verður at, hvørjar spælarar Skála noyðist at vera fyriuttan. Pætur Dam Jacobsen fekk reytt kort seinast, og tí er hann ikki tøkur. Hartil eru Pauli G. Hansen, Alexandur Johansen og Jónhard Fredriksberg allir á skaðalistanum, og tí er talan enn einaferð um eina tunga kabalu, sum Jóhan Nielsen skal fáa at ganga upp, tá hann setir liðið saman.

# Formulaliðið

**Sosialurin manna Formulaliðið við spælarum, sum stóðu seg væl í 7. umfari av Formuladeildini sunnudagin**





## FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*



ATLANTIC AIRWAYS




***Hvar er bólturin?***

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.